Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum
(Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:
"**(Ræðislógin)**"

2. § 1, stk. 2, nr. 7 verður orðað soleiðis:
"7) Heilsumál, læknar, jarðarmøður, sjúkrahús, tó ikki farsóttarmálsøkið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 20. mars 2023 við 29-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 21. mars 2023

stjóri

LM-038/2022